# 14 tunlar til Føroya fólk

**Ynski eru frammi um 14 tunlar ymsa staðni í Føroyum, fleiri av hesum eru partar av samlaðari samferðsluætlan, ið Landsverk ætlar at hava lidna um árslok 2006**

SAMFERÐSLA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Ætlaði tunnilin millum Vestmanna og Leynar*

Arbeiðið við eini samlaðari samferðsluætlan fyri Føroyar verður væntandi liðugt um árslok 2006, svaraði Landstýrismaðurin í Vinnumálum Bjarni Djurholm í fyrispurningi frá Heidi Petersen løgtingskvinnu í tinginum fríggjadagin. Hann vísti samstundis á, at ynski vóru frammi um 12 tunnlar ymsa staðni í Føroyum, men Sosialurin veit um tveir aðrar, ið Landstýrismaðurin ikki nevndi.

Heidi Petersen fregnaðist eftir samferðsluætlanini, tí skjótt eru tvey ár fráliðin, síðan Vestmanna kommuna sendi uppskot um tunnil millum Vestmanna og Leynar til Landstýrið, og svarið var tá, at Landsverk arbeiddi við eini samferðsluætlan fyri alt landið, og at hesin tunnil varð viðgjørdur í hesi ætlan.

Landstýrismaðurin í Vinnumálum Bjarni Djurholm gjørdi vart við, at ynskini um nýggjar tunlar eru nógv kring landið. Umframt Vestmannatunnilin kunnu nevnast tunnil til Fámjins, Dals, Saksunar, Tjørnuvíkar, Gjáar, Viðareiðis, millum Skálabotn og Gøtudal/Kambsdal og undirsjóvartunnil til Sandoynna. Harumframt er eisini ynski um nýggjan tunnil til Hvalbiar, Sandvíkar og norður um Fjall á Borðoynni, umframt at aðrir tunlar hava dagføring fyri neyðini. Afturat hesum tunlum kunnu vit nevna tunnilin undir Leirvík, og nýggjasta hugskotið hjá býráðnum í Havn, um tunnil undir Havnina.

Heidi Petersen vísti á, at teljingar hjá Landsverki vísa, at í 2004 koyrdu 1016 akfør um samdøgrið til og úr Vestmanna. Meðan 1015 akfør koyrdu til og úr Vágunum um samdøgrið í sama tíðarskeiði.

Í fyrispurninginum sigur tingkvinnan »Høgareyn er ikki altíð so tespiligt í hálku og kavarokið hjá vanliga arbeiðsfólkinum, men heldur ikki hjá stóru trailarunum, sum flyta ferskan fisk til virkingar aðrastaðnis í landinum, og ikki minst flyta alla tann liðugt virkaða fiskin úr Vestmanna til Havnar til avskipingar, bara hesin seinni parturin er um 6000 tons og ferski fiskurin til og úr Vestmanna er kanska eini 3000 - 4000 tons afturat. Eisini vil henda íløga føra við sær minnið viðlíkahald, bæði tá hugsað verður um asfaltering, kavarudding og vanligt viðlíkahald annars.«

Landstýrismaðurin dugdi ikki at siga hvørja raðfesting Vestmannatunnilin hevði í samferðsluætlanini, men metingar vístu, at tunnilin væntandi fer at kosta um 300 milliónir.

Heidi Petersen undrast á at arbeiðið við at gera samferðsluætlanina skal taka trý ár.

# Jógvan er samdur um bókasøvnini

**Í sjónarmiði í blaðnum í gjár fanst Martin Næs at mentanarpolitikkinum hjá landinum**

BÓKASAVN
*Jákup Mørk*



*- Tað ber ikki til, at landið bara flytir øki til kommunurnar, hvørja ferð eitt hol er í landskassanum, heldur Jógvan við Keldu*

Millum annað fanst Martin at, at landsmyndugleikarnir nú hava broytt fíggingarmynstrið til rakstur av bókasøvnum, soleiðis at gjaldsprosentið hjá landinum nú verður 40% heldur enn tey 60%, sum áður hevur verið galdandi.

Samstundis stendur landið framvegis við 60% av gjaldinum til skúlabókasavn, og tí heldur Martin, at hetta er tað sama sum at avhøvda fólkabókasøvnini. -Hvør fer at opna eitt fólkabókasavn, har landið rindar 40% av rakstrinum, tá tey samstundis vita, at eitt skúlabókasavn fær 60% endurgoldið frá landinum, spyr Martin.

**Órímiligt mótvegis kommununum**

Og hesum er Jógvan við Keldu púrasta samdur. Fyrrverandi landsstýrismaðurin í innlendismálum, sum eisini hevur drúgvar royndir sum borgarstjóri, er sera harmur um viðgerðina, sum málið hevur fingið.

- Tað ber ikki til, at vit bara flyta øki yvir á kommununar, tá landið skal spara. Hetta havi eg víst á í landstýrinum, tá málið var til viðgerðar, og eg havi eisini víst á hetta undir tingviðgerðini.

Men í greinini sigur Martin, at málið varð samtykt uttan viðmerkingar til 3. viðgerð.

- Tað er rætt. Men tað er sum so óvanligt, at stórvegis viðmerkingar verða gjørdar, tá málið er komið somikið langt. Undir 2. viðgerð fanst eg at leistinum, sum hetta varð gjørt eftir, og hóast avgerðin nú er tikin, so eri eg framvegis ímóti henni, staðfestir Jógvan við Keldu.

At enda sigur hann, at hann sum so ikki er ímóti, at bókasavnsøkið verður flutt yvir á kommunurnar.

- Men tað krevur, at nakrar fortreytir eru upp á pláss, áðrenn hetta verður gjørt. Í mínum hugaheimi, so koma vit ikki at megna at hava bókasavn í hvørjari bygd. Men klára vit at hava nakrar størri kommunalar eindir, sum kunnu taka økið á seg, so er tað eitt annað mál. Tá hava vit nakrar eindir, sum veruliga megna at lyfta uppgávuna, og so er støðan jú ein heilt onnur, sigur Jógvan við Keldu at enda.

## Áarstova.dk fingið nýtt andlit

Føroyingafelagið í Århus hevur seinastu tíðina arbeitt við at útvegað sær eina nýggja heimasíðu. Gamla heimasíðan hevur verið felagnum hent, og hevur so avgjørt verið við til at menna felagið.

Síðan hevur verið eitt bindilið millum limir og felag, av tí sama koma limirnir tættari felagnum, og í framtíðini verður heimasíðan enn meira umráðandi lutur í virkseminum hjá felagnum.

Felagið vónar at nýggja heimasíðan fer at roynast líka væl sum tann gamla. Ein fyrimunur við nýggju síðuni er, at hon er munandi lættari at dagføra, og hetta skuldi helst merkt at síðan gerst enn meira virkin.

Enn er heimasíðan ikki heilt liðug, eitt nú eru myndasøvnini ikki tøk enn, men hetta verður vónandi klárt fyrst í komandi ári

Vitja hana á www.aarstova.dk

## Kirkjuligt Missiónsblað er komið

Hetta er áttanda blað í ár, og snýr seg fyrst og fremst um jólini. Her eru t.d. jólabarnasíðir, ein jólaheilsan úr Tanzania og tvær jólafrásagnir.

Forsíðugreinina hevur Jákup Olsen skrivað við evninum: »Gud flutti inn hjá okkum«. Hetta er eisini ein jólagrein.

**nud**